# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar

27. oktober fingu Ingvar Eiriksson og Anette Tanderup búsitandi í Odense eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3200 gr.

30. oktober fingu Ruth og Rabah Fjallsá Benbakoura, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3250 gr.

3. november fingu Katrin Henriksen og Richard Hansen, Herlev, eina dóttir. Hon var 50 cm. long og vigaði 3440 gr.

7. november fingu Rannvá S. Joensen og Kai Gunnar Stølen, Keypmannahavn, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 3640 gr.

7. november fingu Andriása Símunardóttir og Kári Rasmussen, Saltangará tvíburðar, tvær gentur. Onnur var 42 cm. long og vigaði 1900 gr. og hin var 44 cm. long og vigaði 2100 gr.

11. november fingu Harriet og Johannes Joensen, Vágur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4500 gr.

13. november fingu Sigrid og Rógvi Kjærbech, Århus, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3900 gr.

13. november fingu Jóhanna Sofía og Bernhard H. Petsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3500 gr.

14. november fingu Tóra Hentze og Mass Anthoniussen, Morskranes, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3600 gr.

14. november fingu Pia og Snorri Jensen, Toftir, eina dóttur. Hon var 54 cm.og vigaði 3900 gr.

15. november fingu May-Britt og Johan Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4005 gr.

16. november fingu Josephine Fernandez og Ragnar Heinesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

16. november fingu Hjørdis Fríða Gregersen og Hans Jørgen Djurhuus, Syðrugøta, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3180 gr.

16. november fingu Randi Frederiksberg og Gilli Wardum, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3600 gr.

17. november fingu Marna Joensen og Bogi Slættanes, Argir, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3100 gr.

17. november fingu Valborg Dam Jacobsen og Óla Christian við Sandá, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3500 gr.

17. november fingu Pia og Høgni Hentze, Odense, tvíburðar – 2 dreingir – annar var 52 cm. og vigaði 3600 gr. og hin var 47 cm. langur og vigaði 1900 gr.

## Andlát

15. november
Julianna Nolsøe, fyrrverandi bókavørður, Tórshavn, 90 ár

17. november
Jóhanna Sofía Poulsen, Klaksvík, vanliga nevnd Lilly, 77 ár

20. november
Fríða Olsen, Skálavík, 71 ár

## Edvard Hjalt Nicodemussen 60 ár



Mánadagin 24. november fyllir Edvard Hjalt Nicodemussen á Sandi 60 ár. Edvard er sonur Onnu, f. Hjalt, og Klæmint Nicodemussen, Klæmint hjá Nielsi, á Sandi.

Edvard hevur siglt alt sítt lív. Fyrsta árið hann var burtur, róði hann eitt summar út í Grønlandi. Hetta hevur verið síðst í 50-unum. Eftir tað sigldi hann við Vón og við Dagsstjørnini. Hann var eisini eitt skeið á Háskúlanum í Havn.

Edvard tók skiparaprógv í 1964 og sigldi sum stýrimaður við Nornagesti hjá Thorvald Andreasen. Í 1968 fór hann á stýrimansskúla og tók prógv í 1970, og skipsføraraprógv í 1971.

Hann sigldi sum stýrimaður hjá Kosangas frá 1971 til 1983, tá hann sjálvur saman við brøðrum sínum keyptu línubátin Columbus og seinni eisini Nornagest í 1995.

Í 1976, meðan hann sigldi úti, keypti hann sær ein útróðrarbát, so róði hann út, tá hann var heima. Væl lá fyri hjá honum, hann fiskaði nógv.

Edvard er giftur við Sannu, f. Poulsen, úr Sandvík, og tey eiga børnini Anniku og Henning.

## »Smúkkuhjørnið« við sera vøkrum smúkkum

**Mikudagin 19. november lat ein nýggjur handil upp í Niels Finsensgøtu 51 í Havn**



*Hedvig Reinert Hansen rekur handilin »Smúkkuhjørnið« saman við familjuni. Her er hon saman við dóttrini, Hannu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Talan er um »Smúkkuhjørnið«, sum Hedvig Reinert Davidsen í Havn rekur saman við familjuni.

Tað er Sp/f Búgv, sum nýliga hevur keypt hesi húsini. Hedvig fekk hugskotið til handilin, tá hon sá, hvussu væl húsini lógu fyri í býnum.

Hon hevur fingið umboð fyri Creol smúkkurnar, sum eru gjørdar eystanfyri av silvursmiðum, sum eru lærdir at gera smúkkur eftir donskum kvalitetsnormum. Hetta eru t.d. hálsbond, armbond, ringar, oyraringar og brosjur, sum ikki fyrr hava verið seld í Føroyum. »Smúkkuhjørnið« samstarvar við Creol umboðið í Keypmannahavn.

Handilin er opin yrkadagar frá 14.00-17.30 og leygardag frá 10.00-14.00.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Sanna Vang**
Glyvrar

lá sjúk, andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum, sum sendu blómur, kransar og peningagávu til Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum og til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Martin, Lena og Sunnvard**

## Tøkk

*Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum mintust meg á 85 ára degnum við blómum, fjarritum og heilsanum, ið gjørdu mær dagin ógloymandi.*

*Heilsan*
**Annebeth**



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Bente og John Kjær:

## Silvurbrúdleyp og fimti ára føðingardagur

**Týsdagin 25. november hava hjúnini Bente og John Kjær í Havn verið gift í 25 ár. Dagin fyri, 24. november, fer John um tey fimti**



Bente er dóttir Sonju og Alf Kristoffersen í Havn, og foreldrini hjá John vóru Esther Johansen og Poul Juul Kjær á Tvøroyri.

Bente var nógv ár økonoma á Føroya Barnaheimi. Í dag starvast hon í køkinum á Landssjúkrahúsinum. John er skjalavørður á Føroya Landsskjalasavni.

Bæði eru væl lýdd millum arbeiðsfelagarnar og eru sera dugnalig í arbeiði sínum. Bente og John eru millum manna kanska meira kend fyri annað virksemi enn teirra dagliga arbeiðið. Bæði hava altíð nýtt nógva orku í ymsum sjálvbodnum og óløntum virksemi. Eitt nú eru bæði virkin innan fakfelagsrørsluna. Bente hevur í nógv ár verið forkvinna í Økonomafelag Føroya, meðan John er nevndarlimur í Starvsmannafelagnum og formaður í Eftirlønargrunni Starvsmannafelagsins.

Bente er limur í kirkjuráðnum fyri Havnar kirkju og er eisini í nevndini, ið arbeiðir við at fáa nýggja kirkju bygda í Hoyvík. Hon situr eisini í stýrinum fyri Lágargarð.

John hevur frá ungum árum av nýtt nógva orku í ymsum frítíðararbeiði. Fyrst í skótaliði og ungmannafelag, men tað er tó ítróttararbeiðið, ið hann hevur lagt størstu orkuna í. Hann var ein teirra, ið stovnaði Fótbóltssamband Føroya og hevur verið stjórnarlimur í ÍSF í nógv ár. John er málkønur og áhugaður í fremmandum viðurskiftum. Hann arbeiddi innan FSF tá Fótbóltssambandið fekk limaskap í UEFA og FIFA og tað hevur verið nattúrligt hjá honum at arbeiða við oyggjaleikum. Hann hevur verið við síðan byrjanina, var við at stovnseta altjóða meginfelagsskapin og var í nógv ár nevndarlimur í altjóða oyggjaleikanevndini. Eitt skifti sat hann sum formaður.

Fyri arbeiði sítt er John kosin heiðurslimur í altjóða IGA-felagsskapinum.

Eisini Bente hevur verið aktiv innan oyggjaleikir, bæði sum fyriskipari og ferðaleiðari. Fyri leiklut teirra í føroysku ítróttarørsluni eru Bente og John heiðraði av Ítróttasambandi Føroya. Hon við silvurnál og hann við silvur- og gullnál. John var í nøkur ár ítróttarskrivari á Sosialinum.

Bente og John eru fryntlig og prátingarsom fólk, ið dáma væl at hava fólk rundan um seg. Luttøka teirra í oyggjaleikunum hevur givið teimum nógvar vinir kring nærum allan heim, og í húsum teirra í Hoyvík kemur mangan fyri, at nógv fremmand tungumál eru at hoyra. Antin tí at útlendskir gestir eru komnir, ella tí at onkur er í telefonini.

Bæði eru ung av lyndi og trívast væl saman við ungfólki. Teimum dámar tí væl tá vinfólkini hjá børnunum støkka inn á gólvið.

Meðan John ongantíð alment hevur givið til kennar, um hann hoyrir til ella styðjar ávísan politiskan flokk, so er annaðleiðis við Bente. Hon hevur í nógv ár verið aktiv í politikki. Hon er nevndarlimur í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag og var eitt tíðarskeið forkvinna í felagnum. Hon er støðuføst og varðveitir grundhugsanina um frælsi, javnað og brøðralag, sum grundarlag fyri einum tryggum samfelag.

Tá tey bæði týsdagin hátíðarhalda silvurbrúdleyp og føðingardag, verður hvørki av børnunum við. Bæði eru stødd uttanlanda. Rúni í Danmark í útbúgvingarørindum og Svanna í Grikkalandi, har hon hevur arbeitt í eitt knapt ár.

Tey, ið vilja heilsa uppá silvurbrúðarparið hendan dagin, eru vælkomin inn á gólvið í hølum Starvsmannafelagsins í J.H. Schrøtersgøtu 9 í Havn, týsdagin 25. november, har opið hús verður millum kl. 14 og 19, og øll eru vælkomin.

## Silvurbrúðarparið Maria og Trygvi Samuelsen



Mánadagin 24. november hava foreldur okkara verið gift í 25 ár.

Maria, sum er fødd 5. august 1953, er dóttir Kristian og Enu Zachariasen úr Streymnesi. Seinastu tvey árini hevur hon starvast sum hjálparfólk á Apotekinum í Havn.

Trygvi, sum er føddur 31. mai 1952, er sonur Onnu og Petur Mohr Samuelsen úr Kollafirði. Hann bleiv útbúgvin sum lærari í 1977 og hevur starvast í 25 ár sum lærari við Kollafjarðar skúla.

Hesi nógvu ár tey hava verið saman, hava tey fingið fýra børn, Bárður, Petur, Ena og Jákup. Eisini hava tey tvey deilig ommu- og abbabørn, Linda Maria og Trygvi Jóhann.

Nakað, ið sermerkir foreldur okkara er serliga føroyski dansurin, sum tey hava verið við í í nógv ár. Tey hava staðið fyri barnadansi í Kollafirði í nøkur ár og eisini skipað fyri nøkrum uttanlandaferðum við dansinum.

Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Hósvík leygarkvøldið 29. november 2003.

**Børnini**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

